## VIÐMERKINGAR

# Vallógin

**Hjørleif Waag Høgnesen**
*Klaksvík*



Eg fari við hesum at loyva mær at siga nøkur orð um vallógina.

Fyrst vallógin sum var inntil 1970-ini. Hon segði, at veljast skuldu 20 valumdømisvaldir + 10 eyka-valdir tilsamans 30 tingmenn.

Hetta royndist rættuliga væl. Men so kom monnum til hugs, at um tað kom soleiðis fyri, at tað varð ikki brúk fyri eyka-monnum. Hvussu mangir máttu so úr stólinum.

Í hesum sambandi skrivaði eg tá til nevndina, íð hevði við val at gera, um bara at gera fylgjandi einfaldu broytingar.

1. Gera tingmannatalið til ólíka tal - til dømis 31.

2. Hetta, íð átti at verið gjørt fyri 70 árum síðani: Tað eigur ikki at standa í vallógini at eykamenn kunnu veljast, men tað eigur at standa at eykamenn verða valdir hvørja ferð - allir 11. Og legg til merkis allir 11 verða býttir út hvørja ferð. Sjálvandi, so tingmannatalið altíð verður tað sama, soleiðis sum tað er í øðrum londum.

Við øðrum orðum sagt, kundi lógin verði rættað við einum einasta orði - so einfalt. Men hetta fekk onga undurtøku.

Ístaðin bleiv broytingin gjørd við at hækka talið á valumdømisvaldum tingmonnum til 27 + 5 eykamenn. Hetta var heilt burturvið og tað kom eisini at vísa seg í roynd fleiri ferðir, tíverri.

Síðan hevur verið talað og skrivað av og á um skeivleikarnar í hesi lóg. Men nógv av tí hevur ikki sannført meg um nakað serligt. Hetta málið er og eigur at vera einfalt.

Men! Í Sosialinum 10 aug. og 21 sept 2005 hevur Jógvan Sundsstein í Havn - nú DK, tvær framúr skilagóðar greinir um vallógina. Hann sigur alt tað sum sigast skal, greitt, einfalt og djarvt, og tøkk skal hann hava fyri tað. Eg fari at mæla øllum áhugaðum at lesa hesar greinirnar væl og virðiliga. Sjálvur taki eg undur við hesum sjónarmiðum av fullum huga.

Jógvan Sundsstein hevur ein samandrátt í grein síni, sum stóð í Sosisalinum 21.09 og loyvi eg mær at endurtaka hendan, íð er soljóðandi!

**CITAT BYRJAÐ**

Mítt uppskot.(J.S.)

Høvuðsinnihaldið í mínum uppskoti er, at verandi valdømi verða varðveitt, at smáu valdømini varðveita sínar umboðanir, ein lækking av umboðunum í stóru valdømunum, ein hækking til 33 tingumboð tisamans og at eykavaldu umboðini vera 9 í staðin fyri nú 5.

| **Uppskotið sær soleiðis út:** | |
|---|---|
| Norðoya valdømi | 4 valdømisvaldar |
| Eysturoya valdømi | 4 valdømisvaldar |
| Norðstreymoyar valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Vága valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Suðurstreymoyar valdømi | 6 valdømisvaldar |
| Sandoyar valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Suðuroyar valdøm | 4 valdømisvaldar |
| Tilsamans | 24 valdømisvaldar |
| | |
| Harafturat koma í mesta lagi | 9 eykavaldir |
| Hetta gevur tilsamans max. | 33 tingmenn |

Henda skipanin tryggjar øllum valdømum umboðan, eisini teimum við lítlum fólkatali. Hinvegin vilja tey stóru valdømini, sum lutfallsliga fáa færri valdømisvaldar, fáa teir flestu av teim eykavaldu. Við fleiri eykavaldum verður tryggjað, at tann politisk/idelogiska umboðan verður lutfallsliga røtt, tað vil siga, at flokkarnir fáa lutfalsliga tingmannatal eftur sínum samlaðu atkvøðum fyri alt landið, meðan teir umdømisvaldu í smærru valdømunum tryggja lokalu áhugamálunum góðar umstøður. Annars skal eg eisini viðmerkja, at eg dugi ikki at síggja, at ein broyting frá d`Hondts rokniháttí til Sainte-Lagues gevur nakra serliga meining og skuldi væl veri óneyðug.

**Um hendan skipanin hevði verið nýtt við seinasta væl í 2004 hevði úrslitið verið hetta.**

| **2004** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **H** | **Total** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya valdømi | 1.434 | 602 | 741 | 264 | 849 | 148 | 4.038 |
| | 2 | | 1 | | 1 | | 4 |
| Eysturoya vald. | 1.217 | 2.012 | 1.254 | 529 | 1.254 | 466 | 6.732 |
| | 1 | 1+1 | 1 | +1 | 1 | +1 | 4+3 |
| Norðstr. valdømi | 531 | 663 | 489 | 60 | 582 | 78 | 2.403 |
| | +1 | 1 | | | 1 | | 2+1 |
| Suðurstr. vald. | 2.041 | 2.638 | 2.267 | 527 | 3.076 | 788 | 11.337 |
| | 1 + 1 | 2 + 1 | 1 + 1 | | 2 | +1 | 6 + 4 |
| Vága valdømi | 532 | 663 | 373 | 39 | 263 | 79 | 1.949 |
| | 1 | 1 | | | | | 2 |
| Sandoya valdømi | 259 | 105 | 326 | 22 | 285 | 26 | 1.023 |
| | | 1 | | 1 | | 2 | |
| Suðuroya vald. | 516 | 818 | 1.471 | 20 | 581 | 74 | 3.480 |
| | | 1 | 2 | | 1 | | 4 |
| Total | 6.530 | 7.501 | 6.921 | 1.416 | 6.890 | 1.659 | 30.962 |
| | 5 + 2 | 6 + 2 | 6 + 1 | +1 | 7 + 0 | +2 | 24 + 8 |

**CITAT ENDAÐ**.

Alt rætt og gott. Men tó. Í hesum førinum var brúk fyri 8 av 9 eykatingmonnum. Um vit hugsa okkum, at ein flokkur fær eini 30 til 40% av atkvøðunum á einum løgtingsvali - Fólkaflokkurin fekk á Bartalsmessuvalinum í 1943 oman fyri 40% - so fara vit óivað at renna okkum í hetta 9 - tals loftið. Tá hevði hesin SEINTE-LAGUES roknihátturin komið væl við, tí hann í sínum eginleika minkar um tørvin á eykatingmonnum. Og so tað sama sum eg havi nevnt áður, at allir eykamennirnir - í hesum føri 9 - verða býttir út hvørja ferð, so tingmannatalið verður altíð 33.

### Orðið eykamaður

Ein eykamaður er hann, sum fer inn á ting, tá hinum fasta tingmanninum berst frá. Tað er ikki tað, sum ein eykavaldur tingmaður ger. Hann fer ikki inn á ting fyri ein annan, men sum sjálvstøðugur tingmaður. Tí er heitið eykamaður í hesum høpi ikki brúkbart, og tað setur eisini hesi tingfólk á eitt lægri støði. Men tey eru í veruleika líka nógv verd og vird sum hini valumdømisvaldu. Eg haldi tí, at hesi heldur eiga at verða kallaði *javnsbjóðisvald* tingfólk.

Men at enda skal sláast fast, at tað stóra brekið við vallógini er, at tað eru ov nógvir valumdømisvaldir tingmenn og ov fáir javnbjóðisvaldir. Hava tingmenn dirvi til at broyta hetta - tað er spurningurin.

### Framtíðin

Um eini 10 til 15 ár kunnu vit rokna við, at størri helmingurin av føroyingum býr í Suðurstreymi. Hvat gera vit so? Skal eitt valdømi valda hinum seks? Hetta má umhugsast skilagott!

Vónandi fáa vit eina góða og rúmsátta vallóg.

# Fullveldisríki fara í søguna

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Hvat er eitt fullveldisríki? Tað er eitt ríki sum hevur evsta vald yvir øllum viðurskiftum í egna ríki. Síðani kunnu vit spyrja, hvat ríki hevur evsta vald yvir egnum viðurskiftum? Finst nakað tílíkt ríki? Svarið er eitt klárt og greitt "NEI". Tíðin er farin frá "Nationalstatinum" (fullveldisríkjum) sum í gomlum døgum lítið og einki samband høvdu við onnur lond, og sum høvdu aðrar stýrisskipanir enn tær, vit kenna í dag.

Tá spurt verður, um nakað land er, sum er ment at útinna evsta vald, so var fyrr ofta hugsað um gamla Sovjetsamveldið og USA. Men sum øllum kunnugt so syndraðist Sovjetsamveldið, og í dag verður sagt, at USA er tað einasta landið sum kann kallast at verða ført fyri at útinna evsta vald, bæði í heimligum og uttanríkisviðurskiftum. Hinvegin kunnu vit spyrja, hvar evsta valdið í loftrúminum hjá USA var tann 11. september 2001, tá tann syrgiliga yvirgangsatsøknin gjørdist verðuleiki? Ella hví meta amerikumenn tað vera neyðugt at nýta billiardir til at gera ein missilskjøldur, sum skal girða landið inni, soleðis at tað verður vart móti yvirgangi?

So lat okkum sláa fast, at sjálvt ikki USA er ført fyri at útinna evsta vald, ella verja sínar borgarar ella teirra rættartrygd út í æsir.

Hví sita til dømis íslendingar og normenn og umseta ES lógir? Hví er meginparturin av øllum lógum hjá fullveldunum Íslandi og Noreg í dag ES lógir? Sjálvandi tí at hesi lond hava sæð, at uttan at harmonisera og gerða felags lógargrundarlag, so megna londini ikki í nóg stóran mun at skapa frælsið fyri tað fólk sum har býr, og íslendingar og normenn vita at síðani teir byrjaðu at umseta ES lógir til at vera ráðandi í teirra londum, og síðani teir fingu sáttmála í lag við ES, so hevur búskaparvøksturin verði søguliga stórur.

ES londini hava staðfest, at um tey ikki standa saman um Evropa, so verða tey eftirbátar í kappingini um globaliseringina og um búskaparvøksturin í heiminum. Evropeisk lond í 2005 eru ov smá og ov veik til at útinna fullveldi hvør sær, og tí hava hesi lond brúk fyri hvørjum øðrum, fyri at skapa tann neyðuga búskaparvøksturin, tað neyðugu trygdina og tað neyðuga frælsi fyri sínar borgarar.

Tað var einaferð ein vísur maður sum segði, at um ikki vørur og vøruhandil fáa loyvi at fara um landamørk, so vilja hermennirnir gerða tað. Her vil eg loyva mær at siga, at um ikki kapitalur sleppur um landamørk, so steðgar menningin.

At kalla eitt land fullveldisríki ella nationalstat í 2005, er ein skeiv tulking av veruleikanum. Men tað er ringt at koma burturúr tí sum fyrr var, og tað tekur tíð at venja seg við og góðtaka tann nýggja veruleikan.

Hvat er tað sum ger, at 480 mió. fólk meta seg at hava størri frælsi í eini ríkisfelagsskaps-lýknandi sikpan, meðan færri enn 48.000 fólk meta seg at hava størri frælsi við ikki at vera við í hesum felagsskapi?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.